ÁRSFRÁGREIÐING

til ársaðalfundin 22. januar 2011

Eftir viðtøkunum skal ársaðalfundurin vera hildin áðrenn juni mánaði er úti. Í ár halda vit aðalfundin longu í januar, tí at nevndin eftir áheitan frá kassameistaranum heldur tað vera skilagott at fáa roknskaparárið at fylgja álmanakkanum. Tí máli hava vit rokkið nú.

Á aðalfundinum í 2010 vórðu viðtøkurnar broyttar soleiðis at valdir verða tveir tiltakslimir til nevndina.

Eftir ársaðalfundin skipaði nevndin seg við Maluni Marnersdóttur sum forkonu, Pál Weihe sum næstformanni, Julionnu Klett sum kassameistara, Hilmari Høgenni sum skrivara og Katrin í Gongini sum netstjóra, Súsannu Danielsen sum fyrra og Anniku Marr Poulsen sum seinna tiltakslim. Súsanna hevur verið við á nevndarfundi eina ferð fyri Julionnu.

Síðani aðalfundin tann 20. februar 2010 hevur nevndin havt 8 nevndarfundir: 17.3., 22.3., 30.5., 1.6., 2 2.9., 2.10., 7.12.í 2010 og 20.1. í 2011. Í juli mánaði hittist nevndin rættiliga ofta í sambandi við Ólavsøkuframsýningina.

## Ólavsøkuframsýningin 2010

Ólavsøkuframsýningin 2010 var skipað undir yvirskriftini Toybil: tiðnar ï tánar ï ornar bráðnar. Langt oman fyri hundrað verk komu inn og við á framsýningina vóru 103 verk eftir 38 listafólk, 16 menn og 22 kvinnur. Fimm sýndu á fyrsta sinni fram á Ólavsøkuframsýningini og fleiri av fremstu listafólkunum luttóku. Framsýningin var á henda hátt framhald av gomlum siði, at leik og lærd, ung og tilkomin sýndu fram lið um lið.

Verkini umfataðu olju- og akrylmálningar, tekningar, seymaðar myndir og standmyndir úr glasi og plasti, stáli, steini og pappíri. Á framsýningini vóru tríggjar installatiónir ï uppstillingar. Fyri fyrstu ferð vóru fleiri sjónbandaverk á Ólavsøkuframsýningini. Ofta hevur verið fregnast eftir, nær føroysk listafólk fóru at nýta sjónbandið. Sjónbandaverk hava verið at sæð nú og tá, men nú kunnu vit kanska siga, at listafólkini hava tikið henda formin til sín.

Fleiri verk lýstu tilgongdina, tá ið kavi ella ísur tiðna ella sipa til hesa og aðrar tilgongdir í náttúruni. Nógv viðgjørdu avleiddar tilgongdir eitt nú tað spírandi nýggja lívið eftir kulda, avleiðingar av væntandi broytingum í hitalagnum fyri bústaðirnar o.a.t. Uppstillingarnar lýstu gongdina frá føstum til flótandi tilfar, hvussu tað flótandi ávirkar tað fasta og brigdi av tí. Onkur verk vístu til vísindaligu og listaligu avbjóðingarnar, sum broytingar í náttúruni seta. Hetta vóru listaligar viðmerkingar til viðurskifti í samtíðini, í náttúruni og í mentanini.

Ólavsøkuframsýningin er høvuðsinntøkukelda felagsins við síðuna av limagjaldinum. Tí harmast vit um at sølan var rættiliga lítil. Framsýningin var kortini hampuliga væl vitjað, 1.300 atgongumerki vórðu seld.

## Arvur

Ein og sagt varð frá í fjør skrivaði Janus Kamban, myndahøggari og fyrsti fyristøðumaðurin í Listaskálanum, Listafelagnum húsini fyri at tey skulu verða rikin sum listafólkabústað. Búgvið er ikki endaldiga uppgjørt enn, men tá ið tað er avgreitt, yvirtekur Listafelagið ognina og tekur støðu til umvælingar og hvussu virksemið skal verða skipað.

## Ferðir

Skipað var fyri útferð í Vágarnar at síggja altartalvurnar og kirkjurnar har leygardagin 10. apríl við Palla Gregoriussen sum frásøgumanni. Av tí at undirtøkan var alt ov lítil, var útferðin avlýst.

Hinvegin hevði útferðin noður til Eiðis og Klaksvíkar leygardagin 22. mai góða undirtøku. Sigrun Gunnarsdóttir skuldi lata framsýning upp í ateljerinum á Eiði dagin eftir, men Listafelagið slapp at síggja hana dagin fyri. Sigrun greiddi frá arbeiði sínum og maður hennara Tordur bjóðaði kaffi. Í Klaksvík varð fyrst farið í bókahandilin Leikalund og á Hereford matstovuna, har vit fingu frálíka fiskasúpan og rækjurætt við salati. Síðani vitjaðu vit Edward Fuglø í nýggja ateljeri hansara, har hann vísti og greiddi einum áhugaverdum verki, sum er í gerð, ið er ein parafrasa um *Le déjeuner sur l'herbe*, Morgunmatur á grasvølli, eftir Edouard Manet (1863).

## Stuðul

Felagið stuðlaði 40-ára haldinum hjá Listaskálanum í februar. Haldið umfataði kórkonset við Havnarkórinum undir leiðslu av Ólavi Hátun, røðum eftir landsstýriskonuni í mentamálum, Helenu Dam á Neystabø, forkonuni í Listafelagnum. Í skránni lýsti Ólavur Hátún, hvussu kantatan til Listaskálan kom í lag í síni tíð.

Í juni játtaði felagið Jóhan Martini Christiansen ferðastuðul til listaferð í Evropa.

Felagið hevur játtað stuðul til bókaútgávur hjá Listasavninum:

List í Føroyum eftir Mikael Wivel
List Titu Vinter eftir Anne-Kari Skarðhamar
List Edwards Fuglø eftir Evu Furseth
List Jónu Rasmussen eftir Evu Furseth.

Bøkurnar um list Titu Vinter, Edwards Fuglø og Jónu Rasmussen verða givnar út í sambandi við framsýningar av verkunum.

## Keypt verk

Í farna ári keypti felagið standmyndina Øskuskíggj eftir Jógvan Biskupstø, Figur eftir Hanna Bjartalið, prent av Tinganesi eftir Onnu Seppälä og tekningina Bukka eftir Heiðrik av Heygum.

## Listasavnið

Í sambandi við, at tað varð farið undir at savna almennu søvn landsins í ein stovn, segði nevndin Mentamálaráðnum frá áhuga felagsins í málinum og spurdi seg um ætlanirnar við savninum. Hóast spurt hevur verið aftur, er einki alment svar komið. Kortini skilst á lagnum, at Listasavnið heldur fram sum sjálvsognarstovn, men verður skipað undir Søvnum landsins.

## Fyrireikingar til hátíðarhald

Hóast tað kann tykjast at fara út um frágreiðing til ársaðalfundin frá farna ári, at tosa um tiltøk eftir henda ársaðalfundin, so er kortini alt fyrireikingararbeiðið til eina framsýningarrøð, sum felagið fer undir nú fyrsta dagin, gjørt í farna felagsári.

Tann 23. mars eru 70 ár liðin, síðani felagið varð stovnað. Í tí sambandi hevur nevndin arbeitt við at fyrireika tiltøk, sum skulu gera vart við áhugaverdu søgu felagsins og týðandi leiklut tess til frama fyri føroyska list. Ein undandøttur var 40 ára haldið fyri Listaskálan.

Til tess at gera virksemið hjá felagnum atkomiligari eru tær gomlu gerðabøkurnar 1941-99 skannaðar. Hetta talgilda tilfarið verður lagt fram á heimasíðuni hjá felagnum seinni í ár.

Roynt hevur verið gjøgnum 1½ ár at fáa eina avtalu við amerikanska videolistamannin Bill Viola um at hava eina framsýning í Listasavninum í ár. Tíverri eydnaðist tað ikki, tá ið kom samanum.

Hinvegin hevur nevndin sett saman ein framsýningarskrá við 5 ungum listafólkum, sum hvør hevur sína framsýning fyrst í Havn, síðani í Klaksvík og at enda á Tvøroyri. Avtala er gjørd við framsýningarstøðini, sum eru Snarskivan hjá Tórshavnar Kommunu, Leikalund í Klaksvík og Gallarí Oyggin á Tvøroyri. Framsýningarnar hanga uppi ein mánað á hvørjum stað. Fyrsta framsýningin við verkum hjá Anniku á Lofti, sum letur upp í februar, fer til Klaksvíkar í mars og til Tvøroyrar í apríl. Síðani verða tað:

Heiðrikur á Heygum byrjar í apríl.
Marianna Mørkøre byrjar í juni.

Sámal Blak byrjar í oktober
Jón Sonni Jensen byrjar í desember, er í Klaksvík í januar 2012 og á Tvøroyri í februar 2012.